# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

## Sverri Leivssonur Justinussen 40

Hósdagin 16. august fer ein kendur glyvramaður um fýrati ára hvarvið. Sverri Justinussen. Hann er kendur úr fleiri høpum, og er ein av hesum ungu monnunum, ið ikki hevur latið tíðina bíða eftir sær. Foreldur hansara eru Nancy hjá Glyvra Pola og Leivur við Stein, bæði av Glyvrum. Sverri er eftirdøttur og væl yngstur av systkjunum. Hini eru Marjun, Napoleon og Jústines.

Hann vaks upp í sera góða grannalagnum, har forfedrar hansara høvdu búð í fleiri ættarlið og har nógv av skyldfólki hansara búði og býr. Botnurin til hansara akademiska førleika varð lagdur í Glyvra Skúla. Í fólkaskúla og framhaldsdeild. Hann var ein av teimum, sum fekk studentsprógv úr skúlanum við Gøtugjógv, og hann mundi vera nakað knáur og liggja væl fyri í broddi fylkingar, táið hann var røðari á Gøtusandi hin minniliga summardagin í 1987.

Eftir at hava virkað sum læraravikarur og fyrifallandi arbeiðsmaður í eitt ár, lá leiðin suður á asfaltið. Á Keypmannahavnar Lærda Háskúla. Statsøkonomar plagdu vit at rópa hesar cand. polit´arnar í gomlum døgum, og nú táið alt hevur fingið frøðingaheitið, er hann helst ein av okkara dugnaligu stjórnmálafrøðingum. Hann varð endaliga avlærdur frá KU í 1998, táið hann hevði vart serritgerðina: Aktiemarkets anomalier – med særligt henblik på en eventuel p/e-effekt på det danske aktiemarked. Eftir tað virkaði hann í eina tíð hjá danskari fyritøku, sum fekst við keyp og sølu av partabrævum o.ø.

Hóast hann treivst hampuliga væl í danska stórbýnum, millum vinir og kenningar, mundi ongin ivast í hvagar leiðin fór at ganga. Heimkærur sum hann er, og so merkiliga føroyskt samansettur, varð valið so sjálvsagt. Og hann byrjaði sína yrkisleið í Fíggjarmálaráðnum, táið Karsten hjá Leirvíks-Fríðrikki ráddi fyri borgum úti í Albert Hall, og seinri fekk Føroya Sparikassi klórnar í hann. Har hevur hann verið við í kollosalu menningini hesi seinastu árini, og er nú leiðari á kendu deildini - Eik Markets.



Tíðin, frá tí at neonljósini og teldurnar slókna úti við Strond, hagartil nýggjur dagur rennur úr dimmalættingini aftur, er tjokkfull av diverse áhugamálum. Tíðliga sýndi hann seyðahaldi og akurbrúki ans, og hann hevur verið røktingarmaður hjá skyldmonnunum Heimi í Stovu, yviri á Hjøllum, síðani hann kom heimaftur eftir lesna. Tað var tó í ítróttinum, at hann rættiliga gjørdi um seg. Sagt verður, at hann er ímillum størstu hondbóltstalent, sum yvirhøvur hava verið í Føroyum. Her bregur hann ikki úr ætt, og saman við Jens Martini mundi hann vera meginásin á 1. deildarliðnum hjá NSÍ í áttatiárunum, sum stóð flestu liðum kurl. Ja, leikti javnt upp ímóti vestmenningum og Kyndli. Teir vórðu báðir tiknir út til manslandsliðið, og vóru við ta minniligu ferðina, í seinru helvt av áttatiárunum, táið føroyingar einastu ferðina vunnu á íslendingum í landsdysti. 21-20 á útivølli. Sigur kanska nakað um hvussu hondbólturin kundi havt ment seg, høvdu vit havt skipaðan landsliðspolitik, heilt frá tíðini táið CHM var í Føroyum í 1980. Seinri spældi hann við føroyingunum niðri og síðani við Tjaldur og StÍF tey seinru árini. Prúðu yvirarmarnir borga fyri hørðum skoti, og hann hevur verið ein marra fyri mangan málmannin øll hesi árini. Táið skotríðurnar komu úr vinstru síðu. Nú hava bróðursynirnir tikið yvir, har steinabrøðurnir sleptu. Sverri var harumframt ein fínur fótbóltsspælari, og tey talentini brúkti hann í heimstaðarfelagnum NSÍ. Árini hava síðani gjørt ítróttina til dagdvølju. Motión og innanfurafótbóltur.

Umframt at vera knáur á harmonikuni og durkdrivin sum undirspælari í veitslulagi, er hann í úrvalda liðnum hjá glyvrapresti, Meinhardi Bjartalíð, í Kóri Glyvra Kirkju. Sum m.a. imponeraði allar føroyingar, táið sungið varð fyri yvirtøkuni av kirkjuni, sum er andaliga heimið hjá Sverra og hansara ættarfólki. Hann stórtrívist í natúruni, men hevur tó ikki fingið dráttin frá havinum í æðrarnar, sum pápin meiri at kalla er besettur av. Leivur, sum hevur verið til skips heilt upp í ellisár, fer um tey 82 fríggjadagin, og hann er á floti táið klúgvandi er, og fáur man kenna fjarðarinnar djúpu nám betri enn hann. Tað vignast at kalla hvørja ferð. Sverri býr saman við Piu og dóttrini Nannu í gomlu grótlagaðu húsunum við Stein, og tað sigst, at hann verður burturstaddur hósdagin.

†

## Andlát og jarðarferðir

Kistan við **Páll Sandá** fer úr kapellinum á Suðuroyar sjúkrahúsi og suður í Vágs kirkju mikudagin, 15. august, klokkan 17.00. Jarðarferðin verður hósdagin, 16. august, klokkan 13.00. Tey, ið vilja minnast Páll, kunnu lata Misjónshúsinum í Vági eina peningagávu.

Kistan við **Kathrinu Justesen úr Haraldsundi**, fer úr Kapellinum á Klaksvíkar Sjúkrahúsi í kvøld klokkan 18. Jarðarferðin verður úr Kunoyar kirkju hósdagin klokkan 13.30. Tey ið vilja minnast Karhrinu, kunu lata eina gávu til Norðoya Ellis- og Røktarheim, konto í Norðoya Sparikassa.

Sosialurin
www.sosialurin.fo

**Dagurin**
**16. august. Rokus**, deyður umleið ár 1330. Varð føddur í Montpellier og gjørdist kendur sum tann, ið grøddi fólk, ið vóru rakt av sótt. Tá ið hann kemur til hús eftir ein pílagrímsferð til Róm, verður hann lagdur undir at njósnast, verður tikin og kastaður í fangahús, har hann doyr

## Rektari í 25 ár

Í hesi vikuni er fjórðings øld liðin, síðani fyrstu næmingarnir fóru í skúla í Eysturoyar Studentaskúla og HF skeiði. Mánadagin 13. august vóru 25 ár síðani Sámal í Skorini tók við rektarastarvinum, og Sámal er framvegis rektari.

Tað er nógv vatn runnið í ánna frá tí, at politiska avgerðin varð tikin um skúlan í Eysturoy og til trygga stovnin í og við tí góða umhvørvinum á Kambsdali.

Sámal í Skorini er føddur 19. september í 1952. Hann var sostatt ikki fyltur tredivu, tá ið hann gjørdist rektari. Burðurin var tungur. Fleiri umsøkjarar til rektarastarvið, skriving og politisk øsing og endurlýsing, áðrenn 29 ára gamli havnarmaðurin, sum í Århus hevði lokið embætisprógv í evnafrøði og alisfrøði, varð settur í starvið. Sámal og tey fluttu úr Klaksvík, haðani konan, Maria, er ættað, og til Søldarfjarðar at búgva, og hann halgaði seg fult og heilt uppgávuni at fáa skúlan upp á føtur.

Avbjóðingin var stór. Í tíggju ár var tað stórt politiskt stríð um, hvar skúlin skuldi verða bygdur. Gøta, Kambsdalur, Runavík, Søldarfjørður, Millum Fjarða og Leirvík vórðu nevnd. Bygdarleiðir vóru ikki til, Leirvíkstunnilin var ikki bygdur, og rektarin setti seg í sambandi við busseigarar um at koyra næmingarnar til og frá bygdunum í oynni og norðastu bygdunum í Norðstreymi og til Gøtugjáar. Ferðaseðlarnir vórðu seldir á skrivstovuni í skúlanum, inntil bygdarleiðir, sum



skúlin og rektarin kunnu sigast at hava verið við til at slóða fyri, komu í fasta legu miðskeiðis í áttati árunum.

Áhugin fyri at sleppa í skúlan hevur verið stórur og vaksandi. Nú eru – íroknað HF skeiðið í Klaksvík – 275 næmingar og 39 lærarar í skúlanum. At fáa skikkaðar lærarar at undirvísa úti á bygd var ikki bara sum at siga tað. Fyrstu árini vóru nógvar útskiftingar í starvsfólkaliðnum og okkurt árið var neyðugt at lesa meiri enn helmingin av tímunum á donskum.

Stríðið fyri at fáa tak yvir høvdið var støðugt. Eitt skifti varð hildið til í sjey ymiskum hølum við Gøtugjógv – í 1889 og 1929 skúlabygningunum, bygninginum sum varð bygdur omaná svimjihylin, í kommunala skúlanum, har Petur Eli Mikkelsen, skúlastjóri, sáli, var eldhugaður stuðul hjá rektaranum, og niðanfyri vegin í húsunum hjá Hālduri, garaguni og í Losjuni.

Tá ið avgerðin um at byggja skúlan á Kambsdali endiliga varð tikin, skoladi kreppan yvir samfelagið. Tað bar sparingar við sær, og studentaskúlin á Kambsdali man vera besta dømið um kreppubyggjarí. Tað bøtti um, tá ið tað seinni eydnaðist rektaranum at fáa játtan til skúlahøll og góða sangstovu.

Hóast nógvan turbolens í hølisspurninginum og fyrstu árini nógvar útskiftingar í starvsfólkaliðnum, so hevur tað altíð verið aðaleyðkenni fyri skúlan, at trivnaðurin millum næmingar, lærarar, starvsfólk annars og leiðslu hevur verið stak góður. Eingin ivast í, at rektarin øll 25 árini hevur átt størsta lutin í hesum. Sámal er fyrikomandi og áhugaður í skúlanum, starvsfólkunum og næmingunum. Hann hevur innlit og áhuga í samfelagsviðurskifti í breiðasta týdningi. Hann hevur myndugleika, hann er altíð at hitta, og hann er væl umtóktur.

Í umsitingini og hjá politiska myndugleikanum eigur tað sjálsagt at hava nógv at siga, at tað er royndur rektari, sum veit alt um studentaskúlaskipanina, og at eiga skúlaleiðslu, sum tað ongantíð hevur verið neyðugt hjá at biðja um játtan á eykafíggjarlóg.

Sámal hevur ættarbond á Eiði, og nú eru nøkur ár síðani, at familjan flutti til Eiðis at búgva. Seyðahald er stóra frítíðarítrivið hjá honum, og á Kambsdali plaga tey at skemta sær við, at rektarin hevur hægsta starv í Føroyum. Sámal er røktingarmaður á Slættaratindi!

J